# handVERKARIN

2011 BLAÐ NR. 38 HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# BROYTT LIMAGJALD OG S



*Eli Brimsvík, formaður.*

Í blaðnum hesaferð er eisini kunning til limirnar um, at limagjaldið fer frá 450,- upp í 500,- kr. um mánaðin. Hetta er galdandi frá 1. oktober 2011 at rokna.

Helvtin av hækkingini, ella 25 kr., fer til sjúkragrunnin BATA, sum felagið havur yvirtikið og sum vit nú eiga einsamallir.

Ein partur av semjuavtaluni við Havnar Handverksmeistarafelag viðvíkjandi BATA var, at meistarin frá 1. apríl 2011 ikki skal gjalda tey 30 oyruni av hvørjum tíma til sjúkragrunnin BATA. Hetta var annars galdandi í nógv ár. Hinvegin er avtalað, at meistarin fram til 1. apríl 2013 flytur handverkarans gjald á 15 oyru av hvørjum tíma til grunnin.

Tá felagið nú hevur yvirtikið sjúkragrunnin var neyðugt við broytingum í viðtøkunum, og eru tær við at verða lidnar frá advokatinum.

**Í blaðnum hesa ferð: . . . . . . . . . . . . . . síða**


Broytt limagjald og sjúkragrunnurin BATI. . . . . . . . . . . . . . . . 2
Limagjald, tímaløn, frítíðarløn, gjøld v.m. . . . . . . . . . . . . . . . 4
Eli Brimsvík: Formansfrágreiðing Havnar Handverkarafelags 2011 . . . . . . . 6
Sofus Joensen: Ársfrágreiðing eftirlønargrunnsins . . . . . . . . . . . . 15
Kunning um eftirlønargrunn Havnar Handverkarafelagsins. . . . . . . . . . 20
Eftirlønargrunnurin 2010: Samandráttur av ársfrásøgn . . . . . . . . . . . 29



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag · Stoffalág 60 · Box 203 · 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík · **Forsíðumynd:** Eli Brimsvík.
**Blaðstjórn:** Media · **Umbróting, prent og liðugtgerð:** Føroyaprent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
**Skrivstovutíð:** Mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15.
Telefon 35 48 00 · fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverk@handverk.fo · www.handverk.fo

# SJÚKRAGRUNNURIN BATI

Felagið metir tað at vera ógvuliga týdningarmikið, at grunnurin heldur áfram, og eru vit hóast alt nøgd við semjuna við Havnar Handverksmeistarafelag um BATA.

Tað var á ársaðalfundinum 23. mars 2010, at samtykt var, at limagjaldið skuldi hækkað.

Sigast kann, at vit hava hildið sama limagjald síðani 2005, og áðrenn tað var gjaldið tað sama í eini 20-25 ár.

Ikki tykkum at siga, tíðirnar standa ikki í stað, prísir á mati, el, olju og øllum øðrum vørum eru hækkaðir munandi, eins og lønirnar eru vaksnar. Vit eru noydd at fyrihalda okkum til henda veruleika.

Tí er neyðugt, Sjúkragrunnurin at hækkar limagjaldið, sum hóast alt er minni enn flest øll onnur fakfeløg hava.

Ein kann eisini siga, at okkara skipan vit føstum limagjaldi, er meiri gjøgnumskygd í mun til aðrar skipanir við “prosentgjaldi” av lønini. Við “prosentgjaldi” verður goldið nógv meira limagjald um ein tjenar nógv og minni, tá ið inntøkan er lítil. Við okkara skipan vita vit, at gjaldi er 500,- kr. um mánaðin, uttan mun til um ein tjenar 25.000,- kr. ella 30.000,- kr. ella meira um mánaðin.

Ein onnur broyting er, at frá 1. oktober verða 75,- kr. lagdar afturat í ómaksgjaldi - hjá teimum - sum ikki hava eina sjálvvirkandi gjaldsavtalu, **(við Gjaldsskipanini)**. Orsøkin til hesa broyting er, at vit brúka alt ov nógva orku til at senda rokningar og áminningar út. Vit vilja eisini á henda hátt “minimera” eftirstøðuna av limagjøldum.

Samanumtikið gongur alt rættan vegin, men vit kunnu leggja afturat, at vit altíð royna at gera okkara arbeiði uppaftur betur.

Eli Brimsvík, formaður.

**Felagið metir tað at vera ógvuliga týdningarmikið, at BATI heldur áfram, og eru vit hóast alt nøgdir við semjuna við Havnar Handverksmeistarafelag.**


Málarameistari
RANSIN N. DJURHUUS
TEL. 26 46 82

# LIMAGJALD, TÍMALØN, FRÍTÍÐARLØN, GJØLD V.M.

## Limagjald og Lívstrygging:

Frá 1. oktober 2011 er limagjaldið 500,- kr. um mánaðin.

Ein onnur broyting er, at frá 1. oktober verða 75,- kr. lagdar afturat í ómaksgjaldi - hjá teimum - sum ikki hava eina sjálvvirkandi gjaldsavtalu, **(við Gjaldsskipanini)**.

Felagið heitir tí á teir limir, sum ikki hava meldað seg til **Gjaldsskipanina**, um at venda sær til skrivstovu felagsins millum Kl. 9 og 15 (mánadag til hósdag) fyri at fáa hetta avgreitt.

## Kontur at flyta limagjald á:

Konto: 9181 - 133.013.8
Konto: 6460 - 162.935.4

## Tímaløn:

Tímalønin frá 1. oktober 2010:
kr. 122,91 (minstaløn)
3-ára starvsaldur gevur 1,6% lønarhækkan.
Frítíðarløn: 12%
Konto: 6460 - 299.601.6

## Eftirløn:

Arbeiðsgevarin: 13%
Løntakarin: 2% Tilsamans: 15%
Konto: 9181 - 132.833.8
Konto: 6460 - 152.555.9
Vágs Handverkarafelag:
Konto 6460 - 516.417.8

## Sjúkragrunnurin BATI

Løntakarin: 15 oyru pr. tíma. (eftir skatt)
Umsiting: Sjúkragrunnurin BATI
Postboks 3227, 110 Tórshavn.
Tlf. 229578 – fax: 319178.
Teldupostur: hdg@post.olivant.fo
Konto: 6460-4951044
Konto: 9181-4955791

## Lærlingar:

Lærlingar gjalda kr. 10,- pr. viku í limagjaldi.
Konto: 6460 - 401.200.5
Lærlingalønir (% av sveinalønini)
1. árið: 32%
2. árið: 40%
3. árið: 45%
4. árið: 55%
Eftirløn til lærlingar: 7,5%
Konto: 9181 - 132.833.8
Konto: 6460 - 152.555.9

## Eftirútbúgvingargrunnurin VITAN

Arbeiðsgevarin:
10 oyru pr. tíma. (eftir skatt)
Løntakarin: 10 oyru pr. tíma. (eftir skatt)
Umsiting: Vinnuhúsið
Postboks 1039, 110 Tórshavn.
tlf. 30 99 00 - fax: 30 99 01.
Teldupostur: mikkjal@industry.fo
Konto: 9181 - 495.879.0
Konto: 6460 - 101.278.0



Linde Gas
AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútsgerð
Køligass

*Upplatingartíðir :*
mána, -friggjadag
8:00 - 17:00
Tlf, 315544
e-mail: Gassola@gassola.fo
**www.gassola.fo**

# ELI BRIMSVÍK: FORMANSFRÁGREIÐING



*Eli Brimsvík, formaður.*

Regluligi ársaðalfundur felagsins varð hildin 30. mars 2011 í hølum felagsins í Stoffalág 60.

Seinastu árini hava búskaparkreppur og arbeiðsloysið rakt meint um allan heim. Álvarsamastu hendingarnar í Føroyum vóru helst, at EIK BANKI mátti bjargast av Fíggjarligum støðufesti og, at Faroe Seefood og onnur stór virkir fóru á húsagang. Hetta merktist í øllum samfelagnum. Tað mest álvarsama var, at arbeiðsloysið gjørdist stórt.

Vit meta ikki at, at handverkarar hava merkt hesar trupulleikarnar í sama mun sum aðrir samfelagsbólkar. Her eiga vit at nevna, at tað ofta verður sagt um handverkarar, at teir eru rættuliga "mobilir", og megna betur enn aðrir samfelagsbólkar at laga seg eftir umstøðunum.

Eitt gott barometur hjá Havnar Handverkarafelag er, hvussu nógv limagjald verður goldið til felagið í mun til árini frammanundan. Hyggja vit isolerað eftir hesum, so kunnu vit ikki siga, at talan hevur verið um stórar broytingar. Limatalið og limagjaldið í 2010 var rímiliga stabilt. Hetta kann hava samband við, at ALS hevur hækkað síni útgjøld og, at tað hevur haft við sær, at okkara limir ikki hava spart limagjaldið burtur.

Hinvegin er støðan í Eftirlønargrunninum ein onnur. Hyggja vit eftir inngjøldunum til Eftirlønargrunnin, so síggja vit, at har er talan um eina minking í 2010 í mun til árini frammanundan. Tað er onki, at ivast í, at hetta hevur samband við fíggjarligu rembingarnar í samfelagnum.

Í ársfrágreiðingini í 2009 førdi eg fram, at tað var "beklagiligt", at tað almenna ikki syrgir fyri at seta arbeiðir í gongd, tá ið niðurgangstíðir eru. Tað mátti verði betur at fólk kundu arbeitt, heldur enn at liva av ALS.

Men soleiðis hugsar okkara politiska skipan tíverri ikki.

## EIK BANKI

Sum vit vita mistu mong pening, tá EIK BANKI fekk álvarsamar fíggjarligar trupulleikar, og endaði í "Fíggjarligum støðufesti". Tí eigur her at vera nevnt, at av tí, at Havnar Handverkarafelag átti partabrøv í EIK BANKI, so vóru vit eisini rakt. Tá tíðindi fóru at ganga um, at EIK BANKI hevði trupulleikar fluttu vit innistandandi úr bankanum. Vit valdu at binda um heilan fingur.

Tað var, at frøast um, at tað eydnaðist at fáa bankan uppá rættkjøl aftur.

## Rættarmál

Vit kunnu ikki siga, at fíggjarligu trupulleikarnir í samfelagnum hava merkt, at felagið hevur mett tað vera neyðugt at reisa fleiri sakarmál fyri limir okkara enn gjørt hevur verið árini frammanundan.

Vit hava reist nøkur rættarmál vegna limir, men tað hevur verið á sama støði sum árini frammanundan.

## Ognin í Stoffalág 60: Handverksdepilin

Tá ið vit fluttu skrivstovuna úr Sjúrðargøtu yvir í Stoffalág 60, tóku vit avgerð um at innrætta kjallaran í Stoffalág 60 til ymiskt virksemi.

Vit høvdu rokna við, at ein ávísur tørvur var á góðum – ikki ov stórum - lokalum, við køki og allari neyðugari tekniskari útgerð, sum í dag verður brúkt t.d. í sambandi við skeið og fyrilestrar. Ein partur av hesum er sjónvarpsútgerð við stórskíggja og gott internet samband, sum kann brúkast av mongum samstundis.

Vit hava haft greinar og myndir í Handverkaranum um hølini, og møguleikarnar sum liggja í hølunum og útgerðini.

Vit vóru sum vera mann spent uppá, hvussu fór at vera við eftirspurninginum og undirtøkuni.

Nú kunnu vit bert staðfesta, at avgerðin var røtt og, at eftirspurningurin hevur verið á leið tað, sum vit høvdu vóna.

Hølini hava verið leiga út til mong ymiskt endamál, so sum føðingardagar og konfirmatiónir.



*Kári Petersen, greiddi á aðarfundinum frá ætlanini sum liggur í eftirlønarreforminum*

Hølini hava eisini verið leiga út til almennar stovnar til skeiðvirksemi.

Her kunnu vit leggja afturat, at vit ikki høvdu roknað við, at áhugin eftir so stuttari tíð gjørdist so stórur. Í onkrum føri hava vit - tí verri - verið noydd at siga, at hølini eru útleigað tann dagin, sum tey ynsktu. So tað er avgjørt at gleðast um.

Lat okkum her eisini nevna, at vit gjørdu eina roynd, at vísa fótbólt í hølunum, tá ið heimsmeistarakappingin í fótbólti var í Suðurafrika. Men tað fekk als onga undirtøku. Ikki so frætt sum ein limur møtti upp, so tað var ikki nógv at reypa av.

Men ætlanin er kortini at gera eina roynd aftur seinri.

Sum heild hava vit fingið positivar afturmeldingar, men eitt sum er rættuliga sjónligt, er at tað manglar ein útluftingarskipan.

Avgerð er tí tikin um at fáa hesi viðurskifti uppá pláss, og eisini at inniloka undir altanuni, og taka tað uppí kjallaran.

## Ognin í Sjúrðargøtu 9

Tá vit vóru flutt úr Sjúrðargøtu yvir í Stoffalág, gjørdu vit eina roynd at selja ella útleiga ognina í Sjúrðargøtu.

Áhugin var stórur, baði fyri at keypa og at leiga. Men av tí, at tað er vorðið truplari at fáa fígging nú í mun til áður hevur hetta tikið sína tíð sum tað mátti taka.

Men nú kunnu vit boða frá, at vit hava gjørt eina 4 ára leiguavtalu við eitt felag, sum skal hava tannlæknastovu í húsunum.

## Sáttmálasamráðingarnar

Sum kunnugt gekk sáttmálin við Føroya Handverksmeistarafelag og Landsfelag Handverkaranna út 1. oktober 2010. Sáttmálasamráðingar vóru ikki drúgvar, 6 oktober skrivaðu vit undir nýggjan 2 ára sáttmála.

Úrslitið gjørdist ein lønarvøkstur uppá 3,61 %. Árini frammanundan hava vit lagt dent á at fáa eina góða eftirlønarskipan, á tí økinum eru vit komin so mikið langt, at vit hesiferð valdu at fáa alt uppá lønina.

Sum nakað nýtt, eru viðbøturnar nú í prosentum, so tað gevur eisini ein lítlan vøkstur. Aðrar smávegis broytingar eru gjørdar í sáttmálanum.

Vit hava eisini verið til sáttmálasamráðingar við Fíggjarmálaráðið, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og SEV.

Við Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið vóru nýggir eitt-ára sáttmálar undirskrivaðir, sum fevndu um trý prosent. Fyri SEV var hækkingin 1 %.

## EL & IT

Í september 2011 vóru vit bodnir til Noregs, á ráðstevnu hjá EL&IT Forbundet. El&IT Forbundet er okkara samstarvsfelagi í Noreg í sambandi við Sam sáttmálan. Tað er soleiðis, at teir skulu góðkenna tær avtalur, vit gera við feløg, sum skula arbeiða innan offshore í Norra.

Ráðstevnan varð hildin í Bergen, og var tað sera áhugavert at vera við. Tað vísir seg at verða ein heilt annar hugburður á fakfelagsøkinum har. Tað vóru umleið 60/70 fólk á ráðstevnuni, og kjakið var lívligt. Í tí sambandi var heitt á formannin í Havnar Handverkarafelag um at hava eitt innlegg.

Eitt sum vit fingu at vita fleiri ferð var, at teir vóru sera væl nøgdir við samarbeiðið teir hava við Havnar Handverkarafelag, og eisini tey avrik, sum føroyingar gera. Tað er gleðiligt at hoyra.

Tað er eisini komið fram, at tað var ein ónøgd at merkja, millum limir, sum starvast í Noreg. Hví tað er so eru ymiskar meiningar um, men tað skal so eisini sigast, at stórsti parturin er væl nøgdur. Sjálvandi kann altíð finnast okkurt at vera ónøgdur við, men sum heild riggar tað samstarvið væl.

Tað er eisini gleðiligt, at arbeiði í Noreg er økt soleiðis, at tað nú eru um 100 mans, sum starvast, bara hjá Pam.

Nýggja felagið Faroe Offshore Service hevur eisini fingið gongd á har yviri tó, at tað enn ikki er so umfatandi. Vit hava eisini skrivað undir sáttmála við tað felagið. Sáttmálin við Pam Offshore varð sagdur upp til 1. mars 2011 og er nú endurnýggjaður, við smærri broytingum.

## Ósemjur

Á hvørjum ári er altíð onkur ósemja, ið tekur seg upp, og árið í fjør var einki undantak í so máta. Til dømis á einum almennum stovni, var ósemja ímillum ein lim hjá okkum og leiðaran. Har komu vit uppí málið, sum endaði við, at limur okkara fekk uppreisn.

Í einum øðrum føri var ein limur okkara burturvístur úr starvi sínum, uttan góðkenda burturvísingargrund. Eisini her endaði tað við, at viðkomandi bleiv settur aftur í starv, og burturvísingin sjálvandi tikin aftur.

## Enn eitt felag í Handverksdeplinum

Síðani seinasta aðalfund hevur enn eitt felag flutt skrivstovu sína inn í Handverksdepilin. Tað er felagið Føroysk Miðlafólk, sum nú hevur fingið skrivstovusamstarv við okkum.

Fyribilssáttmáli er gjørdur fram til 1. juli 2011, tá endalig støða verður tikin um framtíðarsamstarv.

## J & K Petersen

Seinasta summar, vendi Byggifelagið J & K Kontractors sær til okkum, við umbøn um at gera sersáttmála um arbeiðið at gera “Eiði 2 Suður”.



Avtalan skuldi fevna um teir limir okkara, sum ætlanin var skuldu starvast har. Tá ið avtalan var undirskrivað, stungu trupulleikar seg upp, tí menn føldu, at teir skuldu tvingast at verða limir her, og tað skilja vit væl.

Men lat tað vera rimmar fast, at tað var ikki tað, sum vit avtalaðu. Vit meta framvegis ikki, at vit gjørdu nakað skeivt. Trupulleikin lág í, at vit fingu skeivar upplýsingar frá fyritøkuni.

Vit fingu positivt at vita, tá ið avtalan var gjørd, at eingin persónur var settur í starv.

Hetta vísti seg seinni at vera ósatt, og tað váttaði stjórin í fyritøkuni eisini í sjónvarpinum og í bløðunum. Hetta var sera óheppið, og vísir best, at vit mega verða meir uppá vakt eina aðruferð.

## BATI

Sum vit áður hava nevnt, so ynskja fleiri meistarar sjúkragrunnin Bata har pipari grør.

Fyrstu ferð teir søgdu avtaluna upp var til samráðingarnar í 2005, og aftur í 2007 var tað uppi og vendi. Tað vóru nakrir fundir um málið, men eingin niðurstøða.

Til sáttmálasamráðingarnar var eitt avgerandi krav frá teimum, at vit bundu okkum til at koma til eina loysn. Vit fingu parkerað málið, meðan samráðingarnar vóru, men nú gongur tað ikki meir.

Tað sum meistararnir krevja er, at grunnurin verður uppgjørdur, og annaðhvørt latin til góðgerandi endamál ella, at vit broyta reglugerðina soleiðis, at fæið í grunninum fellur aftur til feløgini.

*Framhald á s. 14*



*Óla Jákup Kristoffersen, orðstýrari, Sofus Joensen, Bjarni Pétursson, Koos Kammings og Danial Pauli Djurhuus nevndarlimir.*




## MINKA UM ORKUNÝTSLUNA Í BÚSTAÐNUM

# ORKULÁN

### Vit veita fígging til orkusparandi tiltøk í sethúsum og íbúðum

Eigur tú hús ella íbúð, sum tú ætlar at endurnýggja ella umbyggja, er møguleiki at fáa lán frá Húsalánsgrunninum, um tiltakið er orkusparandi.

Húsalánsgrunnurin veitir fígging til m.a. bjálving, nýggj vindeygu, nýggjan húsaklædning, nýtt tak, hitaskipan.

Vilt tú hava meira at vita um orkulán frá Húsalánsgrunninum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.

Ring ella støkk inn á gólvið Yviri við Strond, Tórshavn.

ANNIJANNI

**Húsalánsgrunnurin**

Yviri við Strond 6 · 100 Tórshavn
Telefon 314583 · www.husalansgrunnurin.fo

Ídnaðar- og garaguhurðar
Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92

Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður
Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn

rør-tænastan
v/EYÐFINN HANSEN TLF. 22 81 80
Vatn·Hiti·Sanitet·Ventilatión

Ein depil innan skipatænastur

www.mest.fo

At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.

Men **MEST** er eisini so nógv annað.

**Vit bjóða m.a.**

- Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
- Landsins størstu goymslu av eykalutum
- Projekt- og teknistovuarbeiði
- Stórar bedingar og turrdokk
- Leigu av sleipibátum og kranum
- Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)






MEST

**MEST**
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo

Húsavarðartænastan
10 ár
2001 - 2011



# Ogna tær tín egna húsavørð

*- bæði virkir, stovnar og privat kunnu ogna sær ein húsavørð*

sansir.fo

Vit bjóða virkjum, stovnum og privatum kundum fasta avtalu um ein tímasettan húsavørð. Um ásetta tímatalið ikki verður brúkt ein mánaða, kunnu tímarnir flytast til komandi mánaða, so tað ber til at savna tímar saman.

Vit taka okkum av øllum hugsandi húsavarðar-uppgávum. Er nakað átrokandi, eru vit á staðnum beinanvegin.

Somuleiðis eru vit til taks alt samdøgrið, tá ið bráðneyðugt arbeiði skal gerast.

*Vit átaka okkum eisini alt arbeiði í samband við bygging og umbygging av: skúlum, sethúsum, raðhúsum, barnagørðum, íbúðarhúsum.*

*Harafturat alla gólválegging: trægólv, teppi, linoleum og vinyl - eisini til vát- og baðirúm.*

## Reinsa við turr-ísi



NÝTT

Reinsar blámusopp, maskinur, el-lutir og kann eisini nýtast til sandblásing.
Brúkar ikki vætu. Ring og hoyr nærri.

## Betong-saging




NÝTT

Við okkara nýggju Diamant-ketusag kunnu vit skera tjúkdir upp í 57 cm.
Ring og hoyr nærri.

**Húsavarðartænastan Spf**
Brattalíð 8 | Tórshavn
hvt@olivant.fo | Tel. 29 00 29

**Húsavarðartænastan**

Vit hava havt fleiri fundir um máli, sum til seinast endaði við einari semju, sum ber í sær, at tað framyvir bert verður Havnar Handverkarafelag, sum er eigari av grunninum.

Og út frá tí var okkara uppskot, at grunnurin verður deildur javnt millum partarnar og, at vit fáa eina kompensatión í endurgjaldi fyri, at meistarin framyvir ikki kemur at rinda 30 oyru av hvørjum tíma.

Hetta setti øði í mótpartin, men tá teir høvdu summa seg eitt sindur komu teir við einum tilboði, sum gekk út uppá, at vit býttu grunnin javnt og, at vit fáa eina kompensatión.

Nevndin metti, at hetta er frægasta loysnin, og hevur tí einmælt góðkent hesa loysn.

Vit mugu tó gera okkum greitt, at grunnurin nú skal rekast við einum minni fæi, og tað krevur, at vit hækka limagjaldið fyri, at tað kann lata seg gera.

Vit verða eisini noydd at gera rationaliseringar soleiðis, at grunnurin kann rekast fyri ein bíligari pening.

Roknskapurin vísir, at grunnurin ikki hongur saman við verandi inn- og útgjaldi.

Eitt sum eisini liggur í kortunum, er uppá sikt at hækka útgjaldið til 100%.

## Viðtøkur Havnar Handverkarafelags

Á seinasta ársaðalfundi nevndu vit, at vit vóru ígongd við at dagføra lógir felagsins.

Tað arbeiðið er komið so mikið væl áleiðis, at vit kallaðu inn til eykaaðalfund 2. februar 2011, har broytingarnar vóru lagdar fram, og einmælt samtyktar. Tað var ikki tann heilt stóra uppmøtingin, av tí at veðrið var sera vánaligt. Men fundurin var kortini viðtøkuførur. Eitt annað, sum eisini var nevnt, var um innkrevjingina av limagjaldinum.

Tað skal verða sagt, at tað er eydnast at fáa umleið 70% av limunum at gera sjálvvirkandi flyting, men tað er ikki gott nokk.

Vit noyðast so ella so at fáa tað so nær 100% sum gjørligt. Eitt sum vit hava tosað

um í nevndini er at áseta eitt eyka gjald um ikki gjaldsavtala verður gjørd fyri limagjaldið. Um vit fingu limirnar at gjørt gjaldsavtalu høvdu vit frígjørt arbeiðsorku hjá starvsfólkunum, sum so kundu tikið sær av øðrum átrokandi arbeiði, sum nú møguliga liggja á láni. Eisini høvdu vit sloppið undan at brúkt orku uppá at skuldskriva limir tí, at teir tá kunna steðga gjaldinum sjálvir um teir gevast at arbeiða.

Á ársaðalfundinum 23 mars, var samtykt at hækka limagjaldið úr 450.- kr. til 500, kr.

Ein onnur broyting er, at frá 1. oktober verða 75,- kr. lagdar afturat í ómaksgjaldi - hjá teimum - sum ikki hava eina sjálvvirkandi gjaldsavtalu, **(við Gjaldsskipanini)**.

## Nevndin

Nevndin sum nú situr, hevur eftir hondini nøkur ár á baki.

Sum formaður hevur tað verið mær ein heiður at samstarva við hesar persónar. Hetta skal als ikki skiljast á tann hátt, at vit altíð hava verið samdir, men vit eru altíð komnir til eina semju, áðrenn ein nevndarfundur er lokin.

Av okkum trimum, sum standa fyri vali hesaferð, hevur Bjarni valt at takka fyri seg, sum nevndarlimur, men tekur fegin eitt tørn sum varalimur. So er tað upp til tykkum at avgera.

Annars vil eg eisini nýta høvi at takka okkara sera dugnaligu starvsfólkum fyri gott arbeiði. Uttan tey hevði tað ikki borðið til.

# SOFUS JOENSEN:
# ÁRSFRÁGREIÐING EFTIRLØNARGRUNSINS 2011



*Sofus Joensen*

Eitt gott barometur fyri um ein eftirlønargrunnur hevur haft eitt gott ár er at hyggja at, hvussu nógva rentu hann letur limum sínum.

Vit høvdu eina rentutilskriving til limirnar á 5% í 2009. Seinni kom undan kavi, at okkara eftirlønargrunnur – á tí økinum - var tann næstbesti í danska ríkinum. Tað sigur ikki so lítið um, hvussu væl vit klára okkum í kappingini á eftirlønarmarknaðinum.

Í 2010 høvdu vit eina rentutilskriving uppá 4,5%. Tað má eisini sigast at vera sera gott í hesum tíðum. Samanbera vit okkara úrslit við støðuna hjá teimum størstu veitarunum á føroyska marknaðinum, so liggja vit nakað væl oman fyri teirra rentu. Tá vit megna at standa okkum so væl samanborið við t.d. LÌV, sum hevur haft landskassan sum trygdarnet, so kunnu vit ikki lata illa at.

## Viðvíkjandi íløgum

Vit, sum hava sitið í nevndini í Eftirlønargrunninum hjá Havnar Handverkarafelag hava altíð haft sum mál at vera sera varin við okkara íløgum.

Allir serfrøðingar á íløguøkinum eru samdir um, at tað er ein greiður samanhangur ímillum váða og vinning. Tað vil siga, at jú størri váða tú tekur upp á teg størri er møguleikin fyri skjótum vinningi. Men tá skulu vit eisini vera heilt ivaleys í, at tá er samstundis eisini stórur vandi á ferð. Tí í staðin fyri at vinna pening eru eisini stór sannlíkindi fyri at missa pening.

Her kunnu vit nevna, at í viðtøkunum hjá Eftirlønargrunninum stendur, at vit skulu fáa sum mest fyri tann pening, ið vit hava í Grunninum. Ein kann so ímynda sær, at vit siga við



ein íleggjara: Set bara peningin har tú fær mest fyri hann.

Tað kundi havt sera óhepnar avleiðingar. Uttan at taka munnin ov fullan kunnu vit siga, at tá kundi tað gjørst svangligt í okkara Eftirlønargrunni. Og eitt afturat, tá høvdu tað ikki verðið vit, men aðrir, ið høvdu sitið og sagt, hvussu vit hareftir skuldu umsita okkara Eftirlønargrunn.

Eitt annað, ið vit eisini skulu leggja okkum í geyma er, at vit eiga ikki peningin, sum stendur í Eftirlønargrunninum og, at peningurin skal vera tøkur, tá tey, sum hava goldið í grunnin gerast gomul. Tí kunnu vit ikki taka ov stóran váða á okkum. Hvør avgerð má vera væl umhugsa, tá vit gera íløgur. Um íløgan ikki er væl umhugsað, kann tað kosta okkum dýrt og bara ganga tann skeiva vegin.

## Serfrøðingar

Serfrøðingar meta í dag, at tað kann taka fleiri ár at vinna tað aftur, sum mist er tey seinastu árini. Har eru vit í tí støðu, at vit einki hava mist. Onkur kundi kanska spurt: Tá tað eru so stór ivamál við at gera hesar íløgur, hví hava vit so ikki alt standandi í bankunum til hægstu rentu?

Sum øll vita er innlánsrentan í peningastovnunum í dag óvanliga lág, tí er trupult at fáa nakað burtur úr innistandandi í banka.

Tað er nú langt síðan, at rentan hevur verið so mikið høg, at peningurin ikki minkar í virði skjótari enn rentan klárar at fylgja við.

Vit kunnu taka eitt dømi, tað hevur verið ført fram av búskaparfrøðingum, at inflasjónin í fjør var um 2,5%, og rentan av innistandandi í peningastovnunum í sama tíðarskeiði var frá 0,5 % til 1,7 % - alt eftir innistandandi upphædd og hvussu langa tíð, ið peningurin er bundin.

Við so lítlari rentu í mun til inflasjón kann bara blív talan um at missa pening.

Og eitt afturat, fer peningastovnurin á húsagang, so er ein møguleiki fyri, at stórar

upphæddir vera mistar. Tað seinasta dømi var Eik Banki, sum eftir einari nátt brádliga var innsolventur. Var tá ongin bankapakki, sum stóð við endan, so vóru einans einar 750.000 kr. av innistandandi tryggar og tað, sum lág omanfyri var mistur peningur.

Hetta er orsøkin til, at vit hava mett, at tað er skilabest at seta peningin í statsoblikatiónir, ið er ein 100% trygg íløga. Tað er eisini eitt krav frá Tryggingareftirlitinum um trygd.

## Okkara eftirlønir

Inngjaldið í Eftirlønargrunnin er nú komið upp á 15%. Tað var málið, sum vit settu okkum fyri nøkrum árum síðani. Tað málið er nú nátt, og tí kunnu vit vera sera errin av. Spurningurin er nú, hvussu langt vit skulu fara við eftirlønini.

Vit hava t.d. í ár gjørt ein sáttmála við Fíggjamálaráðið, sum er + 2,54%. Tað er avbera gott um hugt verður at tí, ið sagt var, tá samráðingarnar byrjaðu. Fyri fyrstu ferð í longri tíð er eingin hækking í eftirlønargjaldinum. Hyggja vit rundan um okkum, so liggja vit so mikið væl fyri, at vit kunna steðga á eitt bil. Givið er tó, at um vit framyvir skulu sammeta okkum við hini á arbeiðsmarknaðinum, og tað skulu vit eftir mínari hugsan, so skulu vit ikki steðga á 15%, men spakuliga toga okkum upp ímillum tey 15-20%.

## Kapping um eftirlønir

Tað eru komnir fleiri aktørar á føroyska eftirlønarmarknaðin, ið fegnir vilja hava fatur á okkara Eftirlønargrunni.

Betri Pensjón roynir at koma inn á eftirlønarmarknaðin í Føroyum, og teir smæða seg ikki burtur; teir siga alment, at teir vilja verða ein av teimum størstu veitarunum í Føroyum. Og hyggur man eftir, hvør tað er, ið her bjóðar seg fram. Ja, so kann tað vera nakað um tað, tí aftanfyri stendur ongin annar enn Tryggingarfelagið Føroyar.

Vit hava haft samband við Betri Pensjón, og hava teir haft ymiskar møguleikar uppi og vent - tað veri seg bæði viðvíkjandi eftirløn og bíligari trygging. Men teir hava kortini ikki kunna bjóðað okkum nakað betur enn tað, ið vit longu hava.



## Eik og Bank Nordik

Bank Nordik liggur eisini framvið, teir bjóða seg fram at umsita eftirlønir fyri bæði grunnar og privat fólk. Og teir eru heldur ikki smæðnir.

Hin stóri bankin, Eik Banki, hevur eisini eina skipan har teir kunnu umsita eftirlønir.

Eg eri tó av tí áskoðan, at tá bankar umsita eftirlønir vísir tað seg ofta, at úrslitið ikki verður so gott, sum tá vit umsita okkara eftirløn sjálvi.

## LÍV

Vit hava eisini av og á tosað við Tryggingarfelagið LÍV um tað sama, og teir lova bæði gull og grønar skógir - millum annað nevndarsessir og annað gott, men tá tað kemur til, hvat tað kostar, tá skiljast okkara vegir. Tí teir eru snøgt sagt ikki kappingarførir, tá talan er um umsitingarútreiðslur bæði fyri tryggingar og eftirlønir. Heldur ikki tá tað kemur til rentutilskriving av eftirlønum.

## Útreiðslur

Tá vit eru inni á útreiðslum kann eg ikki annað enn fegnast um, at vit kunnu halda útreiðslunum á einum so skilagóðum støði, sum vit hava megnað. Hetta kemst av tí, at vit sjálvi hava umsitingina. Vit eru ikki noydd til at vinna nógvan pening til ein ella annan stóran íleggjara. Alt, sum kemur inn í Eftirlønargrunnin, kemur limum okkara til góðar.

Av tí, ið goldið verður inn í Eftirlønargrunnin fara 5% til umsiting. Hetta fer m.a. til lønir, sundurgreining av tí samhaldsfasta og tí persónliga, lutaeftirløn, aktuar, grannskoðara, Tryggingareftirlit og annað, ið lógir og reglur krevja. Og so tað týdningarmesta, Eftirlønargrunnurin umsitur peningin og tilskrivar okkum rentur líka til vit verða 67 ár. Ja - líka til vit fara foldum frá, og tað verður ikki eitt oyra tikið til umsiting meir enn tey 5%, sum tikin vóru, tá ið goldið varð inn.

## Starvsfólk

Eftirlitið við eftirlønargrunnum og bankum er hert hesi seinasti árini. Tað er helst ein avleiðing av fíggjarkreppuni, og tað er bara gott.

Hetta setir størri krøv til okkara umsiting, sum frammanundan ikki er stór. Tað at vit hava eina lítla umsiting ger, at tað ikki er so dýrt at umsita peningin í okkara grunni. Ikki nær tí tað kostar hjá Lív og Betri pensjón. Og fyri ikki at tala um nógvar danskar eftirlønargrunnar. Og her má sigast, at tey, sum starvast á skrivstovu okkara og, sum dagliga gera arbeiðið við at skráseta limir, sundurgreina eftirlønargjøld, kanna at arbeiðsgevarin flytur tað, ið hann skal, svara telefonum og nógv annað. Hesi fólk gera eitt stórt og týdningarmikið arbeiði.

Eg fari her at takka teimum, og fara so langt sum at siga, at uttan teirra ágrýtni var ongin eftirlønargrunnur; tey skulu hava stóra tøkk fyri gott arbeiði.

## Eftirlønarskipanir í framtíðini

Aftur í ár siga okkara fólkavaldu, at tað kemur ein nýggjur pensjónsreformur, t.v.s. at okkara politikarar umsíðir hava gníggjað svøvnin úr eygunum, og hava samtykt millum annað, at hvør einasti lønmóttakari skal gjalda inn í ein ella annan góðkendan eftirlønargrunn.

Nakrar aðrar broytingar eru eisini komnar til eftirlønargrunnar, sum t.d., at ongin kann gjalda meira enn 25.000,- kr. um ári til eina kapitalpensjón.

Hetta skal ikki skiljast sum, at ongin kann gjalda meir enn 25.000,- kr. í eftirløn, men, at alt oman fyri 25.000 fer í eina lívslanga

eftirlønarskipan – ella eina lutaeftirløn. Hetta er bara byrjanin til tann nýggja pensjónsreformin. Politikarar hava m.a. sagt, at teir miða eftir, at bert 10% av tí persónliga partinum kann gjaldast út í einum. Restin skal í eina lívrentu ella í lívlanga eftirlønarveiting.

## Ongar eftirlønir úr landskassanum

Tað ið politiski myndugleikin miðar eftir er, at landskassin skal sleppa heilt ella partvíst undan at gjalda eftirlønir og helst eisini fólkapensjón. Sum nú er verður øll A-inntøka mótroknað í fólkapensjónini.

Tað, ið vit fáa útgoldið í eftirløn er at rokna sum ein A-inntøka, og fer hetta tí at vera mótroknað. Eisini hava okkara fólkavaldu fingið eyga á, at har liggja nakrar krónur, sum tey fegin vilja hava fingrarnar í. Tey hava úttalað seg og sagt, at tað skuldi verið ein almennur eftirlønargrunnur, sum umsat allar eftirlønir í landinum.

Væl veit eg, at Landskassin eigur partar av hesum peningi, og trúgv mær, teir hava ikki tíð at bíða til teir av náttúrligari orsøk fáa fatur á teimum.

Hetta hevur Jóannes Ejdesgaard, fyrrverandi landsstýrismaður í fíggjarmálum greitt sagt. Eg haldi so avgjørt, at tað hann segði, var skemt. Hann førdi millum annað fram, at peningurin lá nógv betur í Landskassanum enn hjá pensjónsfeløgunum ella bankunum. Fyri mær fyrikemur landskassin at vera eitt stórt botnleyst hol, sum bara gapar, og tað er líka mikið, hvussu vit fylla í, so verður har líka skrall tómt.



# KUNNING UM EFTIRLØNARGRUNN HAVNAR HANDVERKARAFELAGS

Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelags varð settur á stovn 29. desember 1999.

Men áðrenn grunnurin var stovnaður í 1999, varð drúgt fyrireikingararbeiði gjørt, og longu í sáttmálanum, sum var gjørdur 23. september 1995 við Føroya Handverksmeistarafelag, varð eftirlønargrunnur nevndur. Í sáttmálanum varð m.a. tikið soleiðis til: „Frá 1/10-1997 rinda meistarar 1% av lønini í ein eftirlønargrunn hjá Føroya Handverkarafelag. Frá 1/1-1999 rinda meistarar 1% afturat, ella tilsamans 2% í eftirlønargrunnin.

## Inngjøld

Í privatu vinnuni rindar handverkarin 2% og meistarin 13% í eftirlønargjaldi; har er samlaða inngjaldið 15%. Eftirlønargjaldið fyri handverkarar í almennum starvi er 15%, sum arbeiðsgevarin rindar.

## Endamál grunsins

Grunnurin varð stovnaður av Havnar Handverkarafelag, og sambært viðtøkunum er grunnurin sjálveigandi stovnur.

Endamál grunsins er at reka eftirlønarvirksemi til frama fyri limirnar og í samljóði við ásetingarnar í viðtøkunum við høvuðsdenti á samhaldsfast, men eisini á persónligt grundarlag.

## Samhaldsfast og persónligt

At grunnurin skal kunna veita samhaldsfasta eftirløn merkir, at limur kann fáa fast gjald hvønn mánað í eftirløn. Tað, ið nevnt verður "persónligt grundarlag" er ein eftirlønaruppsparing, ið goldin verður út í einum. Greitt verður nágreiniliga frá hesum viðurskiftum seinni í greinini.

## Hægsta vald grunsins

Aðalfundurin er hægsta vald grunsins. Á aðalfundi hevur hvør limur eina atkvøðu, og atkvøðast kann við fulltrú.

Ársaðalfundur verður hildin á hvørjum ári í fyrsta ársfjórðingi, tá m.a. val av nevndarlimum er á skránni.

Nevndin telur 5 limir. Tríggir nevndarlimir verða valdir av og millum limirnar i grunninum á aðalfundi, og tveir nevndarlimir verða tilnevndir av nevndini í Havnar Handverkarafelag.

## Leiðsla grunsins

Leiðsla í grunninum er nevnd og stjórn.
Nevndarlimir 2010/2011:

- Sofus Joensen, formaður
- Marita í Brekkunum, næstformaður
- Eli Brimsvík, nevndarlimur
- Jakobus Kamminga, nevndarlimur
- Hans Jákup Johannesen, nevndarlimur

## Stjóri

Nevndin setur stjóran í grunninum, sum skal hava um hendi dagliga raksturin. Stjóri í grunninum er:
Petur Juul Jacobsen, skrásettur grannskoðari.

## Grannskoðan

Sambært tryggingarlógini og viðtøkunum skal grunnurin í minsta lagi hava ein løg-

*Framhald á s. 22*


2X3 er altíð
eina vitjan verd
2X3
TIMBUR HT TILFAR HANDILIN
DeWALT
Pizza
Tórshavn 31 12 50 • Kambsdalur 44 44 41

gildan grannskoðara. Tann av aðalfundinum valdi grannskoðarin er:
P/F SPEKT, løggildir grannskoðarar.

## Tryggingarserfrøðingur

Sambært tryggingarlógini skal nevndin seta ein ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðing at røkja tær tryggingartøkniligu uppgávurnar v.m. Sum ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðing hevur nevndin sett:
Steen Ragn, cand, act., SB Aktuar

## Limaskapur

Limir í grunninum eru limir í Havnar Handverkarafelag. Limir í øðrum handverkarafeløgum kunnu eisini gerast limir í grunninum, tá nevndin í grunninum hevur tikið avgerð um tað.

Handverkslærlingar kunnu eisini gerast limir í grunninum.

## Krøv til grunnin

Eftirlønargrunnurin verður rikin sambært viðtøkum grunsins, men eisini sambært løgtingslóg um tryggingarvirksemi, nevnd Tryggingarlógin, sum kom í gildi 1. september 2008.

Í viðtøkunum eru ásetingar um, hvussu ognir grunsins skulu handfarast.

Stovnsfæ grunsins er 5 mió. kr.

## Samhaldsfasti parturin

Tann samhaldsfasti parturin er ein sokallað lívrentuskipan. Hettar merkir, at limurin fær eitt mánaðarligt útgjald so leingi hann livir, tá hann fyllir 67 ár. Tó verður útgoldið í minsta lagi í 10 ár. Doyr limurin áðrenn 10 ár eru farin, verður útgoldið fyri tað, sum eftir er av 10 ára tíðarskeiðinum til hjúnafelaga og síðani lívsarvingar.

## Útgjøld

Tal av teimum, sum hava fingið útgjald:
2006: 35 (herav samhaldsfast 15)
2007: 6 (herav samhaldsfast 3)
2008: 14 (herav samhaldsfast 6)
2009: 33 (herav samhaldsfast 26)
2010: 33 (herav samhaldsfast 20)

Er eingin hjúnafelagi og eingir lívsarvingar, verður einki útgoldið.

Útgjaldið verður ásett í mun til, hvussu nógv er inngoldið, og verður avgreitt um skattaskipanina og skattað sum vanlig skattskyldug inntøka.

## Minstamark fyri samhaldsfasta eftirløn

Upprunaliga var skipanin tann, at fyri at fáa lut í samhaldsføstu skipanini skuldi árliga inngjaldið hjá liminum í minsta lagi vera 4.000,- kr.

Var upphæddin minni, fór alt inngjaldið á persónliga eftirlønarkonto.

Var upphæddin størri, fóru tær fyrstu 4.000 til samhaldsføstu skipanina, og tað, sum lág omanfyri á persónliga eftirlønarkonto.

Upprunaliga minstamarkið, sum var 4.000,- kr., er nú 6.000,- kr.

## Tann ikki samhaldsfasti parturin

Tann ikki samhaldsfasti parturin er ein persónlig uppsparingarskipan.

Hetta merkir, at uppspardi peningurin verður goldin til limin í einum.

Goldið verður, tá limurin gerst 67 ár, ella við 60 ára aldur, um serligar treytir eru loknar.

Við deyða verður útgoldið til næstu av-

varðandi. Tá útgoldið verður, verður eitt avgjald á 35% tikið burturav og goldið til TAKS. Restin, 65%, verður útgoldið til limin. Gev gætur, at hetta - sum nevnt niðanfyri – lutvíst varð broytt í 2008.

## Broytingar í 2008

Í 2008 vóru reglurnar broyttar soleiðis, at tann ikki samhaldsfasti parturin nú inniheldur tvær skipanir; ta omanfyri nevndu eftirlønaruppsparingina og eina lutaeftirlønarskipan.

At talan er um eina lutaeftirlønarskipan merkir, at uppsparingin er persónlig og verður útgoldin til limin, frá tí hann fyllir 67 ár. Her er talan um eitt fast gjald, sum verður goldið eina ferð um mánaðin í 10 ár.

Doyr limurin áðrenn 10 ár eru farin, verður goldið fyri tað, sum eftir er av 10 ára tíðarskeiðinum til næstu avvarðandi.

Útgjaldið verður avgreitt um skattaskipanina og skattað sum vanlig skattskyldug inntøka.

## Dømi við trimum skipanum

Siga vit, at ein limur i 2010 hevur goldið tilsamans 35.000,- kr. inn í grunnin, so fara tær fyrstu 6.000 til samhaldsføstu skipanina, tær næstu 25.000 til persónliga eftirlønaruppsparing og restin (4.000) til lutaeftirløn.

### Hetta dømi kann setast upp soleiðis:

| | |
|---|---|
| Samhaldsføst eftirløn | Kr. 6.000,- |
| Persónlig eftirlønaruppsparing | Kr. 25.000 |
| Lutaeftirløn | Kr. 4.000,- |
| Gjald tilsamans | Kr. 35.000,- |

## Limatøl

Limatalið í Eftirlønargrunninum:
2006: 1741
2007: 1979
2008: 2218
2009: 2157
2010: 2357
Umleið 200 lærlingar eru limir.

Í hesum sambandi eigur at vera nevnt, at lærlingar ikki kunna gjalda inn í tann samhaldsfasta partin. Sama er galdandi, tá limur er fyltur 59 ár, tá ið hann byrjar at gjalda inn í grunnin.

## Inngjaldsparturin

Inngjøldini til Eftirlønargrunnin eru ásett í sáttmálum á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum.

Á almenna arbeiðsmarknaðinum eru sáttmálar við Fíggjarmálaráðið, SEV og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Á hesum økjum rindar arbeiðsgevarin øll tey 15% fyri limin.

Á privata arbeiðsmarknaðinum gjalda handverksmeistarar 13% og sveinar 2%.

Inngjøldini fyri lærlingar eru 7,5%, sum handverksmeistarar gjalda.

## Avmarkingar

Limir og persónar, sum móttaka eftirløn eftir limir í grunninum, kunnu ikki ábyrgdast persónliga fyri skyldur grunsins.

Tey rættindi, sum limurin hevur sambært viðtøkunum, kunnu ikki avhendast, veðsetast, nýtast sum útlegg, ella vera fyri rættarforfylging v.m. frá ognarum, ella nýtast til mótrokning fyri møguligum krøvum frá grunninum.

*Framhald á s. 28*



# Vinnugrundstykki á Skarðshjalla til sølu

**Nú hevur tú møguleikan at ogna tær byggibúgvi vinnugrundstykki á Skarðshjalla.**

Sum framhald av útstykkingini á Sandvíkarhjalla, útstykkjar kommunan umleið 15.800 fermetrar til vinnugrundstykki á Skarðshjalla.

Grundstykkini eru ætlað til framleiðsluvinnu, byggivinnu, bilasølu, verkstaðir og líknandi vinnur, sum eru umhvørvisflokkaðar í flokki 3 til 6.

### Stødd av grundstykkjum

Støddin á grundstykkjunum verður millum 800 og 1.800 fermetrar.

Grundstykkini verða útgrivin og grovplanerað, og verður fjarðhiti, vatn, kloakk og el lagt inná hvørt stykkið.

### Kostnaður

Mettur fermeturprísur er. kr. 1.250,00

Helvtin av metta kostnaðinum, fellur til gjaldingar við undirritan av fyribilsskeyti, og restin fellur til gjaldingar, tá ið økið er liðugt byggibúgvið og grundstykkini eru matrikulerað.

### Tíðarætlan

Fyrstu stykkini verða ætlandi byggibúgvin á heysti 2011.

### Fleiri upplýsingar

Um tit vilja ogna tykkum eitt stykki, ella um tit hava spurningar í hesum sambandi, kunnu tit venda tykkum til løgdeildina á telefon 302010 ella senda okkum teldubræv á torshavn@torshavn.fo

Tað skal viðmerkjast, at nøkur av stykkjunum eru avløgd.

Sí annars meira á torshavn.fo.


aquatherm
BAXI
ROYAL SCANDINAVIAN
VØLUND VARMETEKNIK
magn-line
Nýtt orku-konsept frá Demich og Magn:
Allar orkuloysnir til sethús og virkir á einum staði
Les meira um nýggja orku-konseptið og Magnline oljuketilin á demich.fo/orkuhus
SALTANGARÁ
Heiðavegur 80
Tel. 200 380
TÓRSHAVN
Stiðjagøta 2
Tel. 200 300
VÁGUR
Á Marknoyri
Tel. 560 370
HITAPUMPUR
KETLAR
VENTILATIÓN
RØR OG FITTINGS
BAÐIRÚMSMØBLAR
GOSBAÐ
demich
Saltangará
Tórshavn
Vágur
HVS-VEITARIN
TIL VINNUNA
Okkara døgntænasta er at hitta á tel. 200 345
Tí velja handverkarar Demich
Vit veita bestu ráðgevingina
Vit eru landsdekkandi
Vit umboða dygdarvørur
Vit hava kappingarførar prísir
Vit hava góða kundatænastu
Vit hava døgntænastu
Vit hava framkomnar blikksmiðjur
Á smiðjuni í Havn kunnu vit tilevna inndekningar upp til 3 m
www.grafikmaster.fo
demich
Hiti ▪ Ventilatión ▪ Sanitet
Okkara dygd – tín trygd!
www.demich.fo

Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo

BYGMA
BALSLEV













ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

sansir.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

# SKAPANDI ÚTBÚGVINGAR

www.tst.fo
skapandi umhvørvi

## Tekniski Skúlin

.... ein virkin og góður samstarvsfelagi

Ein skúli, ið gevur góða og samanhangandi undirvísing, í tøttum samstarvi við vinnu og lærling

- vit seta lærlingin í miðdepilin
- vit nøkta tørvin hjá vinnuni
- vit hava høgan námsfrøðiligan og fakligan førleika



Bil
Maskin
Smiðja
El
Timbur
Stíl@Snið

Tekniski Skúlin, Postrúm 3239, 110 Tórshavn, tlf. 738050, t-postur tst@skulin.fo, www.tst.fo

## Øll viðurskifti í væl vardari skipan

Øll inngjøld verða skrásett á persónliga konto hjá hvørjum einstøkum limi, og býtt sundur á tann samhaldsfasta partin og tann persónliga partin - alt eftir -hvussu stórt inngjaldið er.

Tað er umráðandi, at limirnir ansa eftir, at arbeiðsgevarin flytur tað, hann eigur at flyta til Eftirlønargrunnin. Skrivstovufólkini hjá Eftirlønargrunninum kanna inngjøldini, men tað eru tíverri dømi um, at inngjøldini ikki eru sum tey eiga at vera.

Gev gætur, at peningur, sum goldin verður í Eftirlønargrunnin, skal ikki vera skattaður.

### Inngjøld

Inngjøld í Eftirlønargrunnin seinastu 5 árini:

2006: 16,3 mió. kr.
2007: 19,5 mió. kr.
2008: 24,1 mió. kr.
2009: 24,5 mió. kr.
2010: 24,3 mió. kr.

## Limatal og aldur á limum í Eftirlønargrunninum



# EFTIRLØNARGRUNNURIN 2010: SAMANDRÁTTUR AV ÁRSFRÁSØGN

## RAKSTRARROKNSKAPUR

| | 2010<br>kr | 2009<br>kr |
|---|---|---|
| Eftirlønargjald | 24.330.358 | 24.514.521 |
| Rentuinntøkur og vinningsyti v.m. | 5.330.057 | 5.162.058 |
| Virðisjavningar | 1.064.799 | 2.979.478 |
| Fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi | - 486.247 | -338.940 |
| **Úrslit av íløguvirksemi til samans** | **5.908.609** | **7.802.596** |
| Útgoldnar veitingar | -2.113.339 | -2.559.867 |
| Broyting í eftirlønaravsetingum | -2.902.337 | -2.771.431 |
| **Útgoldnar veitingar og broytingar í avsetingum til samans** | **-5.015.676** | **-5.331.298** |
| Fyrisitingarkostnaður | -1.313.493 | -1.018.474 |
| Flutt úrslit av íløguvirksemi | -4.664.357 | -5.997.226 |
| **Tryggingartekniskt úrslit** | **19.245.441** | **25.967.343** |
| Íløguúrslit av eginognini | 4.664.357 | 5.997.226 |
| Skattur av ársúrsliti | 0 | 0 |
| **Ársúrslit** | **23.909.798** | **25.967.343** |

## FÍGGJARSTØÐA HIN 31. DESEMBER 2010

| | | |
|---|---|---|
| **OGN** | | |
| **Fíggjarligar íløguognir** | | |
| Aðrar fíggjarligar íløguognir til samans | 151.620.537 | 120.522.805 |
| **Fíggjaríløgur til samans** | 151.620.537 | 120.522.805 |
| **Ogn í umferð** | | |
| **Tøkur peningur** | 5.190.747 | 9.336.772 |
| **Ogn í umferð til samans** | 5.190.747 | 9.336.772 |
| **OGN TIL SAMANS** | 156.811.284 | 129.859.277 |
| **SKYLDUR** | | |
| **Eginogn til samans** | 12.322.141 | 8.830.111 |
| **Ábyrgdarlán** | 5.000.000 | 5.000.000 |
| Limakontur | 107.926.900 | 87.509.132 |
| Eftirlønaravsetingar, solidariskar | 29.935.338 | 27.033.001 |
| Onnur skuld | 1.626.905 | 1.487.033 |
| **SKYLDUR TIL SAMANS** | 156.811.284 | 129.859.277 |


Nýtið bara bestu útgerð umborð á føroyskum fiskiførum
VARTA
Battariír Til Øll Endamál
Fartelifonir
Hoyri Apparatir
Ur og mangt annað
Eisini hava vit øll vanlig battariír
Heil- og smásøla, landsins bestu battariír, og landsins bestu prísir
PÓLAR
Akkumulatorhandilin v/Margeir Ørvarodd
Sigmundargøta 26 - 100 Tórshavn
tel. 31 83 47 - fax 31 83 67 fartel. 21 28 00


Tú ert handverkarin!
... og vit hava eitt spennandi arbeiðspláss til tín
Vit kunnu bjóða
• spennandi arbeiðsuppgávur
• ein fjølbroyttan og áhugaverdan gerandisdag
• starvsfólkamenning
• trivnað
Hevur hetta tín áhuga, ring so til okkara ella send okkum eitt teldubræv
SENDISTOVAN
LM ELECTRIC
Hoyvíksvegur 53 100 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 lm@lm.fo www.lm.fo
LM Electric bjóðar heildarveiting innan el-innlegging, ráðgeving og projektering
· El-innleggingar · Ljós og talvur · EDV-& telefonnet · Neyðstreymsskipanir (no-break og diesel)
· Trygdarskipanir (ABA, ITV, AIA og ADK) · Hvítvøruservice
Døgntænastan svarar altíð á tel 35 12 20

## Glarmeistarin v/Poul Guttesen.



Søla og montering av
lágorkutermorútum ,
u-virði níður í 0,4 .
Einkultglas, spegl, herða glas
til brúsu–og glasveggir.
www.glarmeistarin.fo

Alt Glarmeistaraarbeiði verður gjørt. 219466-229466






PENSJÓN

# Áðrenn tú hevur vent tær, er framtíðin her

Tosa við okkum um tína pensjón í dag



**Skjótt skulu allir føroyingar gjalda til egna pensjón, og við tíðini fara minst 15 % av tíni løn til pensjón. Vit geva tær møguleika at velja millum fleiri sløg av pensjónum.**

**Vel millum:**

- **Kapitalpensjón** - tá fært tú pensjónina goldna út í einum
- **Lutapensjón** - tá fært tú pensjónina goldna út í lutum yvir í minsta lagi 10 ár
- **Lívrentu** – tá tryggjar tú tær eitt mánaðarligt útgjald, so leingi tú livir

**Set teg í samband við okkum í dag og tekna pensjón, tí áðrenn tú hevur vent tær, er framtíðin her.**

Vit samstarva fyri at veita
tær eina enn betri tænastu

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Eik

Betri pensjón